# Damuríðitúrur – kvinnur á rossabaki



*Damurnar á myndini frá vinstru: Elsa Maria, Jacqulin, Rúna, Bryndis, Kristfríð, Anja, Marita, Sanna, Súsanna, Sigrun, Gunrid, Óluva, Tina, Vilbjørg og Jensa*

Tey seinastu mongu árini hevur tað í Føroya Ríðingarfelag verið siðvenja, at gera ein árligan damu ríðitúr eftir miðjan august mánaða. Í ár varð túrurin planlagdur at vera leygardagin 22. august kl. 11 úr Havnardali. Hvør leiðin verður henda dagin velst um veður og vind. Leygarmorgunin var av fagrasta veðri, men av tí at fleiri av damunum skuldu luttaka í skrúðgongu um tað mundi, sum skuldi vera fyri Poul Mohr, sum fylti áttati henda sama dag, bleiv damutúrurin útsettur til kl. 14 ístaðin.

Fimtan vælupplagdar damur møttu upp í Havnardali kl. 13 og við Gunrid sum kapteini var semja um at fara fyri Sunnan tvs. suður undir Kamb. Við væltrenaðum rossum og fyltum saðiltaskum gekk leiðin upp á Velbastaðháls og haðani yvir í Reynsmúlalág, ið hevur hýst mongum fólkafundi og har tann víðakendi av gróti lagaði Prætikustólurin stendur. Tað var vist eisini á hesum staði at kendi sangurin hjá Jóannes Patursson (1866-1946) "Boðar tú til allar tjóðir" fyri fyrstu ferð varð sungin alment á fólkafundi 9. juli 1905. Eitt sera áhugavert øki - eitt av náttúruni formað amfiteatur.

Síðani gekk leiðin suður undir Kamb. Onkur misti skógv á veg suðureftir, men skógvingina tað kláraðu damurnar sjálvar, og eftir stuttan steðg var aftur klárt at ríða. Komnar suður undir Kambin var saðla av so ross og damur kundu njóta løtuna. Rossini nutu tað saftríka fjallagrasi og damurnar nutu tað sum í saðiltaskunum var. Ein ógloymandi løta – høgt til loft og vítt til veggja. Onkur helt fyri, at tað var deiligt at vera dama á fjøllum í Føroyum. Eftir í sólskininum at hava etið seg mettar og vælsettar og ordnað verðins problematikkin gekk leiðin heimaftur. Enn ein ógloymandi dagur var at enda komin.

**mg**

---

## Tøkk

Vit ynskja at bera eina hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Oluffa Mikkelsen**

andaðist og varð jarðað.
Tøkk fyri kransar, blómur, peningagávur og heilsanir.
Tøkk til Jógvan Fríðriksson og Henning Bøgesvang, kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk til Heimarøktina, Sambýlið á Skála, Sjúkrahúsverkið og Hjálpartólamiðstøðina fyri hjálp og røkt.
Tøkk til familju, vinir og kenningar fyri hjálp og trúfesti undir longu sjúkralegu hennara
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni – frá kapellinum, til kórsetingina og til jarðarferðina.
Hjartans tøkk til øll, sum hjálptu til á ymiskan hátt í sambandi við jarðarferð og ervið,.

*Familjunnar vegna*

**Petur Pauli, Asbjørn, Eyðbjørg, Heri og Marjun**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálp, tá mín høgt elskaða kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Ellen Cemina Poulsen**
(vanliga nevnd Mina)

andaðist og varð jarðað.
Takk til talarar, sangarar, berarar og onnur, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Takk fyri heilsanir, blómur, kransar og til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Henry, Naina, Áshild og Jens Rúni**

---

†

Kæra móðir og mostir okkara

**Anna Petersen**

andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi 22. aug. 2009, 94 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju 26. aug. kl. 13. Sálmabókin verður nýtt.

**Óli, Helena, Marita, Sanna, Ingeborg og John**

Tey ið ynskja at minnast Annu hjá John við blómum, kunnu ístaðin geva Vágs kirkju eina samsýning

---

**Lesið Sosialin - so eru tit við**



---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Georg Hansen, Klaksvík**, andaðist leygarkvøldið á Klaksvíkar sjúkrshúsi, 75 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Tórir Thomsen** andaðist leygarkvøldið í heiminum í Norðagøtu, 91 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Gøtu Kirkju mikudagin kl. 14.

Kistan við **Oluf Ungagarð** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsdagin kl. 17 í heimið í Lopra. Jarðarferðin verður úr heiminum mikudagin kl. 13. Tey ið vilja minnast Oluf, kunnu lata Diabetesfelag Føroya eina peningagávu, konta í Føroya Banka.

Kistan við **Onnu Petersen**, vanliga nevnd Anna hjá John, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsdagin kl. 18.30. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju mikudagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Onnu kunnu lata Vágs kirkju eina peningagávu.

---

## Dagurin

25. august. Ludvík, deyður í 1270. Kongur í Fraklandi, nevndur Ludvík hin Heilagi. Stóð á odda fyri fleiri krossferðum. Á einari ferð til Norðurafrika doyði hann av sjúku. Upprunaliga germanskt navn, ið merkir viðgitin og stríð.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*